## DAGSINS MEINING

# Tann ið tegir samtykkir

Vit vilja á hesum stað og í blaðnum sum heild til eina og hvørja tíð gera okkara til at stimbra samfelagskjakið í Føroyum. Vit eiga so sanniliga eisini at kunna seta spurningar og føra fram sjónarmið, ið ikki altíð eru sum meginrákið í samfelagnum. Endamálið við skriving okkara er tó ikki at øsa fólk ella niðurgera nakran, og harmast vit um, um onkur kennir seg niðurgjørdan.

Málið um løgtings- og landstýrismannapensiónirnar hevur verið rættiliga einsíðugt viðgjørt í føroysku fjølmiðlunum, og tí dittaðu vit okkum at seta fram nakrar spurningar hesum viðvíkjandi í eini oddagrein. Vit royndu at síggja málið úr sjónarhorninum hjá teimum 30, ið sótu í tingsalinum 4. mei, harav eingin atkvøddi ímóti eftirlønarskipanini, og eingin tinglimur gretti eitt orð um hesa eftirlønina, til SVF gjørdi vart við málið herfyri.

30 tinglimir vóru í tinginum tann 4. mei. Allir tinglimir Tjóðveldisfloksins og Sjálvstýrisfloksins atkvøddu fyri. Ein sambandsmaður, seks fólkafloksmenn og tríggir javnaðarmenn atkvøddu fyri og restin av møttu tingmonnum atkvøddu blankt. Tá vit serliga tosa um undanstøkking í samband við Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin, so er tað tí, at tað er serliga margháttligt at floksformenninir í teimum einastu flokkunum, ið vóru 100% fyri eftirlønini, skulu vera teir fyrstu at vaska hendur sínar.

Løgið er, at teir tingmenn, ið halda uppskotið vera "eitt rán" ella sum formaður Sambandsfloksins "eina skomm", ikki atkvøddu ímóti ella gjørdu vart við uppskotið hesar meira enn tveir mánaðarnar frá, at uppskotið bleiv samtykt, til SVF gjørdi vart við málið. Ein kundi eisini spurt, um ikki ein blank atkvøða er støðuloysi, ja onkur vil helst meta hana verri enn eina ja atkvøðu.

Í einum demokratiskum samfelag kann ein og hvør veljast á ting, og sjálvsagt skal tað altíð vera so. Óansæð um tað eru verkamenn ella ikki, so eiga teir at samsýnast væl fyri tað arbeiði teir gera á tingi. Løn eigur at endurspegla ábyrgd, og hvar í Føroyum hava fólk eina tyngri ábyrgd á herðum sínum enn í Løgtingi og Landstýri? Ikki endiliga tað mest populera sjónarmiðið í løtuni, men pláss má altíð vera fyri fleiri sjónarmiðum - eisini viðvíkjandi politikarasamsýning.

Við eftirlønum eins og øllum øðrum samfelagsviðurskiftum vísir tað seg at vera galdandi, at tann, ið tegir, samtykkir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ongin frítíðarskúli á Argjum eftir kl. 12.00

**Leila Hjørleivsdóttir á Lofti**

Nú fara børnini skjótt aftur í skúla … eisini á Argjum.

Á Argjum er tað soleiðis, at 1. flokkur fer í skúla kl. 11.30, og kunnu tá vera í frítíðarskúlanum á Argjum fyrrapart; men nú fara hesi somu børn í 2. flokk og byrja í skúlanum kl. 8.00. Tá tey so eru liðug um leið kl. 11.30, hava tey flestu av hesum umleið 46 børnunum ongan frítíðarskúla at fara til, tí hann er **bert opin fyrrapart.**

Tað skuldi verið óneyðugt at nevnt, at tey flestu foreldur eru tí tí støðu í dag, at bæði arbeiða, aloftast 40 tímar vikur, og tað eru ikki so nógv børn longur, ið hava eina ommu ella abba at ansa eftir teimum, tað mugu vit bara fyrihalda okkum til.

So hvar skulu øll hesi børnini vera eftir skúlatíð?

Vit eru sera væl nøgd við frítíðarskúlan á Argjum, gott arbeiðsfólk við góðum leiðara; men hví 2. floks børnini ikki kunnu vera har um seinnapartin, tað skilji eg ikki.

Eg vil tí heita á býráðið, sum hevur ábyrgdina av hesum økinum, um at bera so í bandi, at frítíðarskúlin eisini er klárur at taka ímóti 2. floks børnunum, nú skúlin byrjar aftur.

# Hvør er út at koyra?

**Henrik Old**



Sera løgnar, men tann í blaðnum týsdagin í hesi vikuni bar av. Oddagreinin bar heitið »Undanstøkking«, og sjálvt útvarpið fekk eina heila tíðindasending burtur úr hesi løgnu oddagrein.

Millum lesarar verða oddagreinirnar í Sosialinum ofta knýttar at Javnaðarflokkinum og teimum sjónarmiðum, ið flokkurin stendur fyri, sjálvt um vit, sum dagliga virka í flokkinum, einki tilknýti hava til hesar greinar og meiningar. Slík niðurgerð og vanvirðing av vanligum fólki skal leitast leingi eftir - helst finst hon ikki. Tað, at 8.400 fólk hava dittað sær at skriva undir eitt mótmæli ímóti eini eftirløn til landsstýrisfólk, sum nærmast er at líkna við eitt rán, verður av blaðnum skýrd øvundsjúka. Blaðið heldur tað vera heilt rímiligt, at tey, ið hava verið í landsstýrinum í átta ár, fáa landsins hægstu eftirløn, og sagt verður, at tey, ið hava skrivað undir mótmælið (skattgjaldarin) hava einki ímoti, at stjórar í almennum partafeløgum fáa millióna upphæddir í løn. Áhugavert hevði verið at fingið at vita, nær skattgjaldarin hevur verið eftirspurdur um hesar stjóralønir. Men tað allar grovasta í greinini er, tá sagt verður: »Samsýningin verður, sum man virðir tað arbeiði, ið gjørt verður. Verður samsýningin hjá politikarum avgjørd eftir lægsta felagsnevnara, so verður samansetingin av ting- og landsstýrisfólki hareftir«. Tað eru fleiri enn eg, ið hava skilt hetta, ið sagt verður um, at samansetingin av ting- og landsstýrisfólki verður avgjørd eftir lægsta felagsnevnara sum, at tey við lægstu lønum einki hava at gera á tingi og í landsstýri. Hetta orðaval er sera langt úti. Tað er væl óhugsandi, at tað eru tey, ið ikki kunnu góðtaka slíka skriving, ið eru úti at koyra. Eg kann vera samdur í, at tað ljóðar løgið, tá ið Høgni Hoydal, sum legði pensjónsmálið fram, nú sigur, at hann ikki var greiður yvir, hvat uppskotið innibar. Tað, at fullveldisfólk ætla at tryggja sær eina góða pensjon, áðrenn fullveldið verður tikið, kann aldrin blíva ein trupulleiki hjá Javnaðarflokkinum, samstundis sum tey, ið treingja heimahjálp, fáa bræv um, at hjá teimum kann ikki gerast reint næstu tveir mánaðirnar orsakað av pengamangli. Um formaður Javnaðarfloksins ikki ger greitt, hvør floksins støða er til hesa ódámligu oddagrein, so er tvingandi neyðugt, at floksleiðslan kemur saman, soleiðis at floksins støða haðanifrá verður gjørd greið fyri javnaðarfólki og øðrum við.

# "Sovereign Explorer" og Faroe Travel á Torginum í SMS

TÍÐINDASKRIV
*SMS*

Nú fyrstu boringarnar eftir olju í føroyskum øki eru farnar í gongd, er møguleiki hjá almenninginum at síggja model av fyrsta boripallinum, sum var at síggja í føroyskum havøki, "Sovereign Explorer". Statoil, sum var fyrsta felag, ið fór í gongd við royndarboringar, sum hevur fingið modelli heim til Føroyar. Tað er enska felagið, Transocean Sedco Forex, sum er heimsins størsti eigari av boripallum, sum eigur bæði boripallin, sum borar í føroyskum øki, umframt modellið, sum verður á Torginum í SMS. Hesin boripallurin er umleið 120 cm x 150 cm. til støddar og 180 cm. høgur, og kann síggjast frá mánadegnum 6. til leygardagin 18. august.

Fríggja- og leygardagin hevur Faroe Travel framsýningarbás á Torginum, har teir bjóða nýggjar og spennandi ferðir til sól og summar suðuri við Miðjarahavið. Støðini, møguleiki er at ferðast til, eru Nice í Suðurfraklandi og Malága í Suðurspania.

Annars heldur stóra summarútsølan hjá SMS fram alla hesa vikuna við nógv niðursettum prísum.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Arbeiðsmarknaðarráð og nýggj semingslóg eru neyðugar nýskipanir til føroyska arbeiðsmarknaðin

**Hans Pauli Strøm,**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



Eitt sum í ólukkumát hevur eyðkent hetta samgonguskeiðið, er tann ágangandi atburðurin frá landsins myndugleikum móti føroysku fakfelagsrørsluni. Hetta hevur gingið sjónliga fram av tí ófriði og viðhvørt beinleiðis ruðuleikakendu viðurskiftum, sum hava verið á arbeiðsmarknaðinum. Og tað er ávíst í dømi eftir dømi í skrivum og ársfrágreiðingum frá feløgunum sjálvum. Vit hava havt ósemjur, trætur og verkføll sum sjáldan áður.

Eg trúgvi tó ikki, at alt lagar seg og vit aftur fáa góð viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum, bert vit sleppa av við hetta landsstýrið. Tað fer at hjálpa, men tað er sjálvandi ikki nóg mikið. Tað eru eisini skipanarligir tvørleikar á arbeiðsmarknaðinum sjálvum, sum elva til stríð millum partarnar sjálvar og innanhýsis stríð millum feløg, sum áttu at verið í sama parti.

Allar hesar drúgvu ósemjurnar, hesar fastlæstu træturnar, hava elvt til at reisa spurningin, hvat vit kunnu gera fyri at fáa meira positivar og smidligar skipanir á arbeiðsmarknaðinum, sum kunnu fremja konstruktivan dialog millum partarnar og framrættaðar loysnir, heldur enn misálitiskapandi og niðurbrótandi eljustríð.

### Partarnir skulu hava ábyrgd, amboð og umstøður sjálvir at loysa ósemjur

Sum tað fyrsta vil Javnaðarflokkurin mæla til, at landsstýrismaðurin í vinnumálum av nýggjum setir nevnd við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, at koma við teimum neyðugu broytingunum til tað ódemokratiska semingslógaruppskotið, sum landsstýrið ætlaði, men tíbetur ikki tordi at seta fram í vár. Í løgmansrøðuni verður fráboðað, at uppskotið fer at verða sett fram í hesu tingsetuni.

Tað, sum tørvur er á, er ein nýggj semingslóg, fevnandi bæði um tann privata og almenna arbeiðsmarknaðin, sum gevur pørtunum ábyrgd, amboð og umstøður sjálvir at loysa ósemjur teirra millum - uttan at politiski myndugleikin ella nakar annar óviðkomandi uttanfyristandandi skal blanda seg uppí og skerja grund-lógartryggjaða rásarúmið hjá pørtunum at virka fyri teirra áhugamálum.

Semingslógaruppskotið hjá landsstýrinum lúkar ikki hesar treytirnar. Tá ið eg kalli tað ódemokratiskt, er tað tí, at landsstýrisuppskotið miðar móti álvarsliga at skerja virkisfrælsið hjá fakfeløgunum, m.a. við at geva einum nýggjum semingsmannastovni víðari heimildir at kroysta sínar avgerðir niður yvir høvdið á fakfeløgunum, enntá ímóti teirra vilja.

### Tað ódemokratiska semingslógaruppskotið hjá landsstýrinum

- Eftir landsstýrisuppskotinum skulu semingsmenninir ikki sum higartil bíða, til teir verða boðsendir av pørtunum. Nei, nú skulu teir kunna fara uppí, tá teir sjálvir halda tað vera neyðugt, uttan at vera bidnir, og harvið taka partarnar av ræði.
- Eftir landsstýrisuppskotinum skulu semingsmenninir ikki sum higartil kunna útseta eitt verkfall í 7 dagar, men tað 4-dupulta, fyrst 2 vikur og so aftur 2 vikur!
- Landsstýrisuppskotið hevur tikið uppaftur eina ódámliga grein úr teirri gomlu donsku semingslógini frá 1928, sum føroysk siðvenja annars hevur sett til viks: nevnliga at semingsmenninir skulu kunna krevja eitt semingsuppskot út til uratkvøðu millum allar limir í feløgunum í verkfalli, uttan mun til hvørja støðu tær lógliga valdu nevndirnar hava.
- Og síðst í hesum ódemokratiska uppskoti er tað kravið til uratkvøðuna, sum er sett fyri at kunna fella eitt uppskot frá semingsstovninum: Tað er ikki nóg mikið, at minst 50% skulu vera ímóti – nei, harumframt skal hetta 50%-kravið økjast við _ %, fyri hvørji 1% valluttøkan fer niður um 75%. Tað merkir, at er valluttøkan t.d. 60%, so krevst ein meiriluti uppá 58% fyri at fella semingsuppskotið. Er valluttøkan bara 50%, so krevst ein meiriluti uppá 63%. Tað er týðiligt, at endamálið við hesi ódemokratisku grein er at gera tað trupult hjá fakfeløgunum at vísa einum semingsuppskotið aftur, sum tey ikki eru nøgd við.

Tí eigur landsstýrismaðurin at koyra hetta lógaruppskotið í ruskspannina beinanvegin. Ístaðin eigur hann at fáa sett eina nýggja nevnd við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, at viðgera uppskot til semingslóg út frá teirra fortreytum – teir hava sanniliga nógvar royndir av ósemjum og verkføllum hesi seinastu árini, og vita hvørjum broytingum tørvur er á. So kunnu vit fáa tað skilabesta uppskotið til eina neyðuga nýggja semingslóg fyri allan føroyska arbeiðsmarknaðin.

### Arbeiðsmarknaðinum tørvar nýtt amboð, eitt arbeiðsmarknaðarráð

At góð, skipaði viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum eru av allar størsta týdningi, haldi eg at allir landsins borgarar og vinnulívið mangan hava sannað, tá týðandi samfelagshjól hava verið støðgað, ella tá heilir landspartar ella landið alt hevur ligið lamið.

Men tað er ikki bara fyri at loysa upp í trætum og ósemjum, at vit hava brúk fyri positivum dialogi og konstruktivum loysnum á arbeiðsmarknaðinum. Tað hava vit eisini brúk fyri til tess at menna okkara arbeiðsmarknað til smidliga at kunna laga seg til tær veldugu tøkniligu og vinnuligu broytingar, sum longu eru ígongd, og sum fara at verða uppaftur størri komandi árini. Arbeiðsviðurskifti fara at verða fyri kollveltandi broytingum, viðvíkjandi útbúgvingar- og førleikakrøvum, fakligum innihaldi, fyriskipan á arbeiðsplássunum, fjølbroyting av arbeiðstíðum, lønarstigum o.s.fr. Tað verða rembingar og togan millum yrkisgreinar og fakbólkar. Og ongin man ivast í, at ein oljuvinna av álvara fer at leggja stórt trýst á okkara arbeiðsmarknað.

### Eitt arbeiðsmarknaðarráð at fremja konstruktivar loysnir

Men á arbeiðsmarknaði okkara er onki felags forum, ongastaðni, har partarnir seta seg saman at viðgera slík viðurskifti, dagsins mál ella komandi avbjóðingar. Eitt slíkt forum manglar, og ongin ivi er um, at tað er tørvur á tí.

Tí vil eg mæla til, at vit fara undir at skipa eitt slíkt forum, eitt arbeiðsmarknaðarráð, har partarnir frítt og óbundið koma regluliga saman at viðgera øll viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum, øll viðurskifti sum teir sjálvir, sum gerandisdagurin og komandi avbjóðingar seta á dagsskránna.

Endamálið við slíkum arbeiðsmarknaðarráði er ikki at fáa eitt organ til taka avgerðir, sum partarnir skulu noyðast at fylgja móti teirra vilja. Endamálið skal tvørturímóti vera at fremja positivan dialog millum partarnar, so at teir sjálvir finna leiðir fram til konstruktivar loysnir. Og arbeiðsmarknaðarráðið kann geva politiska myndugleikanum sínar tilráðingar, um hvat partarnir á arbeiðsmarknaðinum halda vera at gera.

Við semingslógini og arbeiðsmarknaðarráðnum fær føroyski arbeiðsmarknaðurin góð amboð at skipa síni viðurskifti. Tá fæst eisini friður fyri spøkilsum sum arbeiðsrætti og høvuðsavtalum.

# Flogvøllurin eigur at útbyggjast til 1800 metrar

**Marjus Dam**
*Løgtingsmaður*



Í desperatión ætlar Landstýrið at yvirtaka sera nógv stórmál í síðstu løtu av samgonguskeiðnum. Millum annað flogvøllin.

- Sambandsflokkurin sendi í 1997 skriv til danskar myndugleikar um at fáa útbygt flogvøllin. Síðan tykist alt enda í eini fullveldisfløkju - sum so mangt her á landi.
- Tá B. Djurholm alment hevur ført fram, at vøllurin bert kann útbyggast við 200 metrum, er tað ósatt. Vøllurin kann uttan trupulleikar og uttan nevniverdan meirikostnaða byggjast út til 1800 metrar, og tað eigur at vera gjørt.
- Danskir myndugleikar eiga at vera við, ella eiga at gjalda alla hesa ríkisíløguna. Væl kunnu vit yvirtaka flogvøllin, men hann eigur at útbyggast til 1800 metrar áðrenn, ella sum liður í eini slíkari yvirtøku.
- Ein yvirtøka eigur at tryggja starvsfólkum góð kor framyvir.
- Eisini eiga normar at verða lagdir, soleiðis at amboð, bilar o.a. tílíkt verður skift eftir føstum reglum. Somuleiðis eigur framyvir at verða eitt gott samstarv ímillum ríkispartarnar, so vit alla tíðina eru í fremstu røð hvat flogferðslu viðvíkur. Um slík yvirtøka skal fremjast við skili, so tekur tað ofta fleiri ár. Tað hevur tað gjørt í Danmark, har staturin hevur latið flogvallir frá sær.
- Hetta málið er stórt og komplekst - Tað er meira enn bert at proklamera yvirtøku.
- Nú oljuvinnan er farin av bakkastokki, eiga vit at leingja vøllin til 1800 metrar. Hetta arbeiði er kannað og klárt er at fara í gongd. Meirkostnaðurin av at vøllurin verður 1800 metrar í mun til 1450 metrar er ikki stórur. Tí eigur hetta arbeiði at verða gjørt nú.
- Trupulleikin tykist bert tann, at at núsitandi Landstýrið ikki tykist samráðingarført. Soleiðis at skilja, at onki konstruktivt kemur av skafti tá ið teir samráðast. Teir kunnu møguliga røkka eini samráðingarloysn. Men ikki er rætt at taka við eini loysn, um vit gerast verri fyri av hesi orsøk. Um loysingarsamgongan yvirtekur vøllin, uttan útbygging er avtala í samráðingarloysnini, so er vandi fyri, at hann als ikki verður útbygdur. Teir hava nevniliga ikki pening at byggja út fyri. Og tað kunnu vit ikki liva við.
- Eg vil tí, sum løgtingsmaður síggja eina fullkomuliga greiða ætlan um útbygging av flogvøllinum til 1800 metrar, ið smb við tosið um flogvøllin, ið fer fram í løtuni. Hesum skal Landstýrismaðurin vita og svara. Og um hann ikki svarar so skal løgmaður svara. Eg góðtaki ikki, at russisk rouletta verður spæld við einum av stóru arbeiðsplássunum í Vágum. Tað er ábyrgdarleyst.
- B. Djurholm eigur ikki at fremja eina yvirtøku, ið ger tað ómøguligt hjá teimum í koma aftaná, at fremja eina góða loys fyri Føroyar. Eina loysn, ið hann ikki tykist førur fyri at fremja. Aðrir kunnu røkka tað, ið hann ikki er førur fyri.
- Míni ráð til Fólkaflokkin og samgonguna eru hesi: Um tit ikki eru førir fyri at samráðast um eina útbygging av flogvøllinum til 1800 metrar, so skal samgongan ikki yvirtaka flogvøllin. Ríkismyndugleikarnir eiga at vera við til at byggja flogvøllin út. Uttan nakað kjak.